# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Salli Sommer Frankis Lognberg, Skopun**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin klokkan 14 til Teistan. Jarðarferðin verður úr Skopunar kirkju hósdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Salli, kunnu lata Missiónshúsinum í Skopun eina peningagávu, konta í peningastónunum.

**Jóhannes Hansen, Fuglafirði** andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 57 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Herborg Strøm í Vági** andaðist mánadagin 16. mars, 91 ára gomul.

# Listaframsýning í Smiðjuni

Komandi vikuskifti byrjar ein framsýning hjá Hera av Reyni í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin letur upp fríggjadagin 20. mars kl.16 og er opin til og við týsdagin 24. mars.

Hetta er aðru ferð Heri av Reyni hevur framsýning í Smiðjuni. Á framsýningini eru málningar, aquarellir og tekningar av landsløgum í Suðurstreymi.

Framsýningin letur upp fríggjadagin kl. 16 og er opin til kl. 20. Leygardagin, sunnudagin, mánadagin og týsdagin er opið frá kl. 14 til 20.

Tá framsýningin letur upp spælir Brandur, sonur Hera, nøkur klassisk stykki á guitar.

*-red*



*Fríggjadagin letur ein framsýning hjá Hera av Reyni upp í Smiðjuni í Lítluvík*

Fyri 25 árum síðan:

# Loynilig radarstøð



sosialurin

NATO-støðin nútíðargjørd eisini til álop

Loy
ame
rada

Á forsíðuni á Sosialinum 17. mars 1984 er yvirskriftin at NATO-støðin á Sornfelli er nútíðargjørd – eisini til álop.

Í meira enn 25 ár hava føroyingar og danir hildið, at støðin á Sornfelli bert hýsti NATO, og at hon hevði lítlan týdning, men nú kemur í ljósmála at umframt at hýsa NATO, hevur amerikanska flogvápnið sína egnu topployniligu radarstøð á Sornfelli. Nevniliga skermarnir niðan fyri NATO-kuplarnar, skrivar danska hernaðarkritiska blaðið "Forsvar".

# Óli Berg deyður



Sunnunáttina andaðist Óli Berg, lærari, í Nesi, Hvalba, 57 ára gamal. Óli var hvalbingur, sonur Onnu, f. Djurhuus úr Sumba og Daniel Jacob Berg úr Hvalba.

Óli tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1977 og var lærari á Venjingarskúlanum í Havn frá 1977 til 1979, tá hann fekk lærarastarv í Hvalbiar skúla.

Umframt starvið sum lærari hevur hann verið skrivari hjá Hvalbiar kommunu, og hann var eisini nevndarformaður í lemmatrolaranum Niels Paula, heimahoyrandi í Hvalba.

Óli var giftur Hannu, f. Jacobsen, úr Havn.

*-red*

**Dagurin**
**18. mars. Aleksandur**, deyður umleið 250. Úr Aleksandriu og endaði sum biskupur í Jerúsalem. Fleiri ferðir varð hann atsøktur fyri trúgv sína, men komst undan og doyði ein natúrligan deyða, og varð blóðvitni uttan blóð, sum tikið varð til.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

**50 ára føðingardagur**
Leygardagin 21. mars fyllir Jóngerð Midjord 50 ár. Føðingardagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldsundi frá klokkan 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 21. mars kunnu Niklas og Jensia Joensen í Kollafirði hava gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá dóttrini, undir Heygnum, á Todnesi 17 frá klokkan 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
25. apríl 2009 kl. 12 giftast í Betesda, Klaksvík: Elsebeth P. Eyðunsdóttir Jacobsen, Svínoy og Marni Steinberg, Klaksvík. Veitslan verður á hotel Norð kl. 16. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu tekna seg á tlf. 226916 (Elsebeth) ella tlf. 220061/ 287307 (Marni) innan 31. mars 2009.

# Fysioterapeutur á Tjarnargarði

Turið Lamhauge Nónklett er sett í starv sum fysioterapeutur á Tjarnargarði. Turið fer at hava fyribyrgjandi venjingar á liði fyri heimabúgvandi pensjónistar.

Fleiri fólk standa á bíðilista til venjingarlið og tey, sum hava bíðað longst, verða tey fyrstu, ið fáa møguleikan. Tilboðið vendir sær til heimabúgvandi pensjónistar í Tórshavnar kommunu, sum á henda hátt kunnu koma á eitt venjingarlið á Tjarnargarði.

Tórshavnar kommuna ynskir við hesum at geva pensjónistum møguleika at venja, soleiðis at tey framhaldandi kunnu hava góða heilsu. Samstundis verða tey betri fyri í tí dagliga og kunnu í størri mun vera sjálvhjálpin.

Umsóknarblað fæst í Snarskivuni til teirra, sum ynskja at melda seg til skipanina. Eisini ber til fáa umsóknarblað á heimasíðuni hjá kommununi.

*Kelda: www.torshavn.fo*



*Turið Lamhauge Nónklett*